# Vildi tosa við Bush

**Ein íslendskur studentanæmingur var um reppið at sleppa allan vegin ígjøgnum til amerikanska forsetan, George W. Bush, tá hann ringdi eitt nummar í Hvítu Húsunum, ið ikki er ætlað almenninginum**

SKÁLKABRAGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

16-ára gamli Vífill Atlason helt sjálvur, at hann fekk eitt fínt hugskot, tá hann kom fram á eitt telefonnummar, hann einaferð hevði fingið, og sum eftir hvat sigst skuldi verða beinleiðis til skrivstovuna hjá Bush í Hvítu Húsunum.

Til stuttleika ringdi hann upp, og tá hornið varð tikið í hinum endanum, var tað eitt starvsfólk í vestvonginum í Hvítu Húsunum. Atlason greiddi við síni djúpastu rødd frá, at hann var íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, og at hann ætlaði at tosa við George W. Bush, fyri at bjóða honum til ein privatan fund í Íslandi.



*Var tað ikki tí, at George W. Bush sat á fundi, hevði 16-ára gamli íslendski studentaskúlanæmingurin, Vífill Atlason, fingið orðið á hann í telefonini*

- Eg ætlaði bara at práta eitt sindur við hann og bjóða honum til Íslands fyri at vita, hvat hann segði til tað, segði nasadjarvi unglingin við ABC News.

Hann bleiv undir telefonsamrøðuni stillaður um gjøgnum øll tey Hvítu Húsini og spurdur um smálutir um forsetan, til hann endaði á sjálvari skrivstovuni hjá Bush.

- Tey royndu at eftirkanna meg við at seta spurningar um føðingardag forsetans, heimstað hansara og hvussu foreldrini eita. Men eg hevði Wikipedia opið og aðrar heimasíður við, so tað var als eingin trupulleiki hjá mær at svara spurningunum, greiddi Atlason frá.

Tá skúlanæmingurin kom til forskrivstovuna hjá Bush, endaði leikurin tó, tí tá fekk hann at vita, at forsetin sat á fundi. Men tað varð kortini lovað honum, at Bush skuldi ringja aftur fáar dagar seinni.

## Tikin og avhoyrdur

Men tá nakar setti seg í samband við Vífill Atlason aftur hesum viðvíkjandi, var tað ikki George W. Bush, men íslendska løgreglan, sum kom eftir honum heima við hús og tóku hann við á løgreglustovuna. Har varð hann avhoyrdur gjølla og leingi um, hvar hann hevði fingið telefonnummarið frá.

- Eg minnist satt at siga ikki, hvussu eg fekk fatur á nummarinum, men tað eru fleiri ár síðani, segði hann.

Nummarið vísti seg at vera beinleiðis linjan til Secret Service Uniform Division, sum tekur sær av trygdini hjá forsetanum.

- Eg gjørdist skelkað, tá løgreglan kom eftir honum, men eg kundi ikki rættiliga gerast ill við hann. Hann er jú ein uppfinnsamur drongur, og hann er nú vorðin ein fólkahetja í Íslandi, fortelur mamman, sum illa fær fjalt stoltleikan um sonin.

Vífill Atlason bleiv eftir avhoyringina koyrdur heim til foreldrini aftur. Hann varð fyrst hóttur við innferðarbanni í USA, men hetta bann varð seinni tikið aftur. Secrety Service vil ikki gera viðmerkingar til hendingina, skriva íslendsk og donsk bløð.

